## Dómarar hjálpa Wolfsburg

Málmaðurin Jens Lehmann hevur altíð dugað at gjørt vart við seg, og nú er hann aftur komin í yvirskriftirnar. Hann heldur, at oddaliðið í bundesliguni, Wolfsburg, hevur fingið hjálp frá dómarunum at røkka heilt fram í kappingini. Lehmann heldur, at Wolfsburg ongar dómaraavgerðir hava havt ímóti sær. Um Wolfsburg fær minst javnleik í seinasta dysti í týsku kappingini, eru teir meistarar.



## Wenger fjasast við Real

Vanliga hevur Arsene Wenger avvíst blankt, tá ið hann hevur verið settur í samband við annað felag enn Arsenal, har hann starvast, men Wenger hevur seinastu dagarnar sent heitar tankar til Spania. Wenger sigur, at Real Madrid er eitt áhugavert felag - ikki minst um Florentino Perez aftur verður forseti í felagnum.

B36-NSÍ 2-3 (2-0):

# Traðkaðar vespur reistu seg

*B36*

*NSÍ*



*Hjalgrím gekk á odda, tá NSÍ bókstaviliga togaði seg aftur í dystinum móti B36*
*Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir*

**B36 hevði dystin í pottinum, mení trimum fantastiskum korterum pluss fýra eyka minuttum spældi, trýsti og bardi NSÍ seg til trý stig**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Kontrastirnir vóru øgiligir, tá liðini fóru av vøllinum. Hjá B36-spælarunum vendu eyguni beint niður í svørðin, meðan teir skjótast gjørligt royndu at smoyggja sær inn í skiftirúmið at sleikja sær sárini.

Hjá NSÍ lýsti viljin hinvegin úr spælarunum. Vónleysa hálvleiksstøðan varð vend. Takkað verið einum framúr liðavriki, har hvør einasti maður gav seg 100% í samfullar minuttir eftir steðgin, og har teir at enda fingu uppiborna løn fyri stríðið.

### Eftir heimabókini

Tapið mundi eisini kennast eyka svárt hjá heimaliðnum av teirri orsøk, at fyrstu trý korterini gingu júst soleiðis, sum teir høvdu ætlað sær.

Eins og í so nógvum øðrum dystum hetta kappingarárið, so var útgangsstøðið hjá B36 hampuliga varligt.

Fyrst og fremst royndu teir at binda um verjupartin, fyri síðani at hótta mótstøðumálið í skjótum raidum niðan eftir vøllinum. Nakað sum riggaði til reint UG fyrstu trý korterini. Ikki bara fingu teir tvey mál eftir uppskriftini, men í tveimum øðrum førum var eisini nær við, at skjóta umstillingsspælið gav úrslit. Men fyrru ferðina sparkaði Róaldur Jacobsen framvið, tá Óli Hansen forerdi honum bóltin, og seinnu ferðina var Høgni Madsen heppin at verða verandi á vøllinum, tá hann eftirtacklaði Brima Koroma, sum var ávegis ein-móti – einum støðu.

### Jústinus var lykilin

Eftir steðgin vendi dysturin fullkomuliga. Pauli Poulsen tók bæði Høgna Madsen og Jann Martin Mortensen út í steðginum, og bæði Jústinus R. Hansen og Klæmint A. Olsen áttu sín stóra leiklut í, at tað eydnaðist gestunum at koma aftur í dystin.

Hóast Jústinus ikki var tann mest eyðsýndi, so spældi hann ein framúr seinna hálvleik, har hann sum miðvallarsweepari støðugt var akkerið, sum vann returbóltarnar á miðvøllinum, so trýstið hjá NSÍ kundi fasthaldast. Ikki minst tí hann sjáldan var atvold til fríspørk og harvið steðgir í spælinum. Og við 2-2 málinum var Klæmint tann, sum styrkti eyka nógv um trúnna hjá gestunum.

Hjá B36 kostaði tað hinvegin nógv, at teir í ov stóran mun duttu í verjustøðu. Snøgt sagt gjørdist frástøðan niðan til álopið ov stór, og tí høvdu teir sera trupult við at hótta konstraspælinum. Og so kundu runavíkingar leggja enn meira fyri í sínum trýsti.

### Intensitetur

Fram um stóra skiftið, sum altíð er, tá ein dystur vendir frá 2-0 til 2-3, so var talan um ein serstakliga intensan dyst. Spælið hevði til tíðir hug at tangera til tað heilt ljóta, men mest av øllum var hetta úrslit av, hvussu nógv spælararnir á báðum liðunum løgdu fyri dagin.

Og hóast kortini kanska kundu sitið leysari, so tænir tað Lars Müller til rós, at hann royndi at samskifta við orðum heldur enn kortum.

Kropsliga var tað tó NSÍ, sum vann sær yvirtakið, sum dysturin leið. Seinastu løtuna tóktist tað bara vera ein spurningur um tíð, áðrenn avgerandi bólturin fann vegin til meskarnar. At dómarin legði fýra minuttir afturat teimum 90 gav bara gestunum enn meira mót, og tá 93 minuttir vóru farnir, fingu teir løn fyri tacklingarnar, stríðið og innsatsin. Alt í alt eitt avrik, sum bendi á, at NSÍ væl er ført fyri at taka heilt tungu tøkini í avgerandi dystunum, og at liðið eigur profilarnar, sum kunnu avgera dystirnar.

Hjá B36 var talan hinvegin um áminning og lærupening. Partvíst um æviga sannleikan um, hvussu vandamikil ein tvey-mála leiðsla er, og partvíst um tann veruleikan, at skalt tú vinna ein dyst, skalt tú eisini tora at vera betri enn mótstøðan.

## Málini í Gundadali

1-0: Sam Malson, 17. min
B36 byrjar skjótálop á egnari hálvu. Sam smoyggir sær hegnisliga fram við tveimum á miðvøllinum, og tá NSÍ-verjan bakkar, høggur bretin til úr 23 metrum og bólturin flýgur beina leið í málhornið.

2-0: Sam Malson, 19. min
Hesa ferð fær Malson bóltin á brotsteigarmarkinum. Hóast hann hevur ryggin móti málinum, fær hann hegnisliga sneitt mótstøðumann av sær, áðrenn hann smekkar bóltin flatt inn um nærmasta stólpan.

2-1: Hjalgrím Elttør,
Eftir hornaspark í vinstru fær B36-verjan ikki rættiliga ruddað bóltin. Hjalgrím skotfintar við høgra, áðrenn hann við vinstra langar bóltin upp í málhornið úr 13 metrum

2-2: Klæmint A. Olsen
Tað tykist ikki vandamikið, tá Bogi Løkin akkurát fær sneitt innlegg úr vinstru. Tróndur Vatnhamar ivast tó, og so fær hann bara júst-að bóltin út frá málstrikuni. Og so kemur máltevið hjá Klæminti til sín rætt, tá hann stútar í tóma netið.

2-3: Jann Ingi Petersen, 93. min
Potemkin stríðir seg ígjøgnum í høgru, og eftir eina blokeraða skotroynd endar bóltruin hjá einum leysum Jann Inga, sum ivaleysur smekkar bóltin í meskarnar.

## Átti ikki orð

Vónbrotið lýsti av liðskiparanum hjá B36, Klæmint Matras, tá tað stóð greitt, at hann og liðfelagarnir úr B36 høvdu tapt, hóast teir høvdu tvey-mála leiðslu.

- Eg veit ikki um vit eru bagnir, tá vit koma út til seinna hálvleik. Men vit klára slett ikki at hava bóltin í egnari røð, og tað er fyrst og fremst tað, sum kiksar hjá okkum, haldi eg, segði Klæmint Matras.

Undan dystinum var líkt til, at hetta var slagið um, hvør av tykkum skuldi fylgja við HB í oddinum. Hvussu stórur er missurin, nú tit taptu dystin?

- Hann er sjálvandi stórur, og beint nú havi eg ikki orð fyri, hvussu vónbrotin eg eri. Men tað er bara eitt at gera hjá okkum, og tað er at koyra á, segði Klæmint Matras.

## Vistu vit kundu

Málið hjá Jann Inga Petersen í yvirtíðini sunnudagin var hansara fyrsta, síðani hann í vetur gjørdi av at skifta til NSÍ. Og fagnaðurin um hetta var sjálvandi ovurstórur.

- Hatta kendist væl. Tað er langt síðani eg havi skorað. Hatta var mítt fyrsta mál fyri NSÍ, og tað gav okkum trý stig, so hatta var fantastiskt, segði Jann Ingi Petersen.

Tit vóru í álopi so at siga allan seinna hálvleik. Góvu tit ongan tíð skarvin yvir, tá tit vóru aftan fyri 2-0?

- Í hálvleikinum vistu vit, at vit høvdu kjansin, og vit fóru longur niðan á vøllin at trýsta, og tað riggaði. Talan var um ein sera harðan dyst, har nógvir nærdystir og nógvar tacklingar vóru, og sjálvt um øll stig eru eins týðandi, so kendust hasi ótrúliga týdningarmikil, segði Jann Ingi Petersen eftir dystin.

**-mørk**